gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Menning uttan fyri mistaðarøkið

Ein afturvendandi spurningur her á landi og í flestu av londunum kring okkum, er miðsavnanin av fólki og virksemi til høvuðsstaðin ella økið nærhendis. Vit kenna hetta tjakið úr Noregi, har Norðurnoreg stríðist fyri at yvirliva. Vit kenna hetta eisini úr Íslandi, har tað gerst alsamt trengri kring Reykjavíkarleiðina. Her heima hevur orðaskiftið um bygdamenning verið afturvendandi, men tað tykist bert ganga tann eina vegin, og tað er, at bygd fyri bygd - øki fyri øki - doyr út. Meðan tosað verður um, hvat kann gerast fyri at steðga avtoftingini og eitt nú stórar íløgur eru og verða gjørdar í infrastrukturin, so tekur avtoftingin bara dyk á seg.

Tað er í hesum sambandi at settir eru arbeiðsbólkar at koma við uppskotum um, hvussu man kann venda hesi gongd. Í fyrsta lagi verður kannað, hvussu økini í landinum kunnu mennast og í øðrum lagi hvussu búsetingin í útoyggj ella smáoyggj kann varðveitast. At neyðugt er at seta arbeiðsbólkar at kanna hesi mál vísir bara, hvussu álvarslig støðan er. Tí man skuldi trúð, at lokalpolitikararnir á tingi vóru so mikið sterkir, at teirra valdømi eisini fingu sín ríkiliga part av samfelagskøkuni. Hóast hetta so er helst so torført at stýra útviklinginum verða ikki munagóð tiltøk gjørd. Tvs. við fríum marknaðarkreftum verður gongdin at halda fram ótarnað. Fólk flyta til tey størru plássini, tí har er arbeiði, har er frítíðarvirksemi osfr. Spurningurin er, hvat kann gerast fyri at stegða hesi gongd. Eitt er at smáoyggjar sum Fugloy, Skúvoy og Mykines líða undir hesi gongd, annað er hvat hendir við størri oyggjum so sum Suðuroynni, Sandoynni og Vágum. Taka vit Vágoynna er har nógv virksemi og er oyggin eisini kjarnan í flogflutninginum. Nú verður gjørdur undirsjóvartunnil til oynna. Sandoyggin var illa fyri í kreppuni, men okkurt røkist fyri, at oyggin er við at mennast aftur. Nýtt skip verður eisini sett inn har. Stóra "problembarnið" er helst Suðuroyggin. Hvat kann gerast fyri at skapa gróðarlíkindi har? Nýtt Suðuroyarskip er á veg og tað er ein sera týðandi liður í at varðveita búsetingina og menna oynna. Spurningurin er bara, um betran av samferðsluni er nóg mikið! Neyvan.

Hvat vit enn halda um fríu marknaðarkreftirnar, so mugu vit seta okkum spurningin: eru tær ikki við til at taka grundarlagið undan smáoyggjum og ávísum økjum av landinum? Skulu vit t.d. menna Suðuroynna eru vit so ikki noydd til at stýra útviklinginum og siga, at eitt nú oljuvirkssemið ella stórur partur av tí skal fara fram í ella frá oynni! Tá meiriluti ikki fekst fyri, at alt virksemið skuldi vera frá Suðuroynni var ein orðing gjørd, ið sigur, at slíkt virksemi skal eisini vera í hesi oyggj. Nú fáa vit so at síggja, hvussu leikur fer, tá avgerðin skal takast um oljubasan og alt tað virksemi, sum er knýtt at komandi leiting og framleiðslu. Spurningurin um komandi oljuvirksemið er helst nógv meira prinsipiellur og álvarsligur enn mong av okkum halda. Her er ein møguleiki at fremja økismenning. Vilja vit tað? Hin mátin er at lata marknaðarkreftirnar ráða, og so er tað upp til politikarnar at prioritera íløgurnar til øki og smáoyggjar uttan fyri miðsteðarøkið. Fær Suðuroyggin einki ella lítið oljuvirksemi, so ber til at krevja, at oljuinntøkur skulu brúkast til at menna oynna uppá aðrar mátar.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Leggur frá sær eftir 30 ár

Mikudagin var seinasti skúladagur hjá Ása Jacobsen á Tvøroyri. Ási fyllir 60 ár 1. jóladag, 25. desember og hetta høvið brúkar hann til at fara frá við eftirløn.

Ási er føddur á Tvøroyri í 1940, sonur Albert Jacobsen á Tvøroyri og Emilie Jacobsen úr Fuglafirði.

Ási var ongin ársungi, tá ið hann fór á lærarskúla. Eftir lokna skúlagongd, fór hann til Danmarkar, har hann fór í grannskoðaralæru, har hann var í eitt ár. Men í 1961 fór hann í danska herflotan, har hann fór á yvirmannaskúlan. Í danska herflotanum sigldi hann við fleiri skipum, m.a Peter Skram, Hvidbjørnen, Rolf Krage, umframt við seglskipum, minuleggjarum, o.s.fr.

Ímeðan hann gekk á yvirmannaskúlan, las hann eisini týskt og latín á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, men hetta sampakkaði ikki so væl við útbúgvingini í herflotanum, so hann gavst at lesa.



Men danski herflotin var heldur ikki nakað fyri hann - ella sum hann sjálvur sigur so skemtiliga: “Je var onki fyri danska herflotan”. Sostatt helt Ási uppat á yvirmannaskúlanum í 1964, men helt kortini fram í herflotanum til 1967. Tá ið hann legði frá sær, var hann sersjantur.

Tá ið hann fór úr herflotanum, fór hann á lærarskúla í Holbæk og har tók hann prógv í 1970. Síðani tá hevur hann verið lærari á Tvøroyri, haðani hann so nú leggur frá sær.

Á Tvøroyri hevur hann mest undirvíst í máli, donskum, týskum, enskum og tí sindri, sum hevur verið av latíni.

Hann hevur eisini ferðast dúgliga við næmingunum, hann hevur verið við teimum á útferðum bæði í Skotlandi, Onglandi, Tysklandi, Luksemburg, Italia, Danmark og Noregi.

Til stuttleika kann eisini nevnast, at Ási Jacobsen er eisini ein av teimum fáu, sum bæði hevur málsigt og matematiskt studentsprógv. Hann tók fyrst nýmálsligt studentsprógv, men tók síðani matematiskt prógv uppá átta mánaðir.

Á Tvøroyri hevur hann eisini verið virkin í felagslívi av nógvum ymsum slag. Hann hevur verið formaður í bridgefelagnum á Tvøroyri í nógv ár, hann hevur verið formaður í svimjifelagnum í eini 12 ár, og hann var eisini venjari hjá svimjarum eitt skifti, hann hevur verið virkin í Tvøroyrar Sjónleikarfelag og hann hevur nevndarlimur í Tvøroyrar Klubba í eitt áramál. Hann hevur eisini fleiri ferðir verið ferðaleiðari, tá ið útlendsk ferðafólk hava verið á á rundferðum í Suðuroy.

Hann sigur, at hann hevur altíð havt nokk at gera, so hann stúrir ikki fyri, at hann fer at keða seg, nú hann fer frá við eftirløn.

Umframt tað felagslív, hann er uppi í, ætlar hann sær at halda hús og heim. Og so hevur hann bøkurnar og tónleikin. So nú verður betri stundir at pløga seg ígjøgnum rithøvundar, sum Pontoppidan, Zweig, Bøll og aðrar, sum honum dámar væl. Og tá ið tónleikur verður lagdur á, er tað mest opera.

Men hann vísir ikki aftur, at hann verður aftur at síggja í skúlanum, skuldi tað verið brúk fyri einum vikari onkran einstakan skúla.

Ási Jacobsen sigur, at hesi 30 árini, hann hevur verið lærari, eru tíðirnar nógv broyttar .

– Eitt er, at børnini eru ómetaliga nógv broyttir. Men tað skerst ikki burtur, at tá ið ein hevur verið lærari í nógv ár, broytist ein eisini sjálvur. Og tað er ein stórur spurningur, hvussu væl eldri lærarir eru førir fyri at laga seg til tær nýggju tíðirnar.

Hann heldur, at teir, sum skipa fyri skúlanum, áttu at lagt á annan bógv.

– Í løtuni fáast myndugleikarnir mestsum bara við at gera nýggjar fólkaskúlalógir til gamlar lærarar. Tað rætta hevði verið at útbúgva lærarar, so at teir eru betri førir fyri at arbeiða undir eini nýggjari skúlalóg.

### Óluva Skaale 60

Óluva Skaale er vorðin 60ár. Hon er ein kend kvinna í landinum og hon er til umrøðu í hvørjum einasta heimi í Føroyum javnan. Hetta kemst av, at hon saman við Marius Johannesen framdi megnarverkið fyri skjótt nógvum árum síðan at skriva og útgeva eina nýtiliga kókibók sum er skrivað til føroysk viðurskifti og sum ger serliga nógv burtur úr heilt vanligum føroyskum mati.

Matur og Matgerð er enn gull verd í hvørjum húsarhaldi. Er grind, so fær tú at vita hvussu tú matgerð við grind. Tú fær eisini ,at vita hvussu tú hongur upp, saltar, turrsaltar og so víðari. Er tú ikki ættaður úr fuglaplássi, so kann tú sum einki fylla lunda upp á gamla máta og hava fuglasuppu afturvið og hesum kann tú millum annað takkað Óluvu Skaale fyri.

Óluva Skaale er lærari og gjørdist heilt kend sum sjónvarpskokkur, tá Svf tók tey fyrstu fetini fyri 20 árum síðan og føroyingar sum heild seta



hana í samband við mat. Serliga ráma suðuroyarmálið setti seg fæst fast í minnunum á føroyinginum. Og um nakar lesir hetta so ivist eg ikki at hann hugsar: “Óluva fyllir ikki tríssj, men trýýýsss.” Ikki tí, tað sæst ikki á henni, at hon er ein framúr kokkur, hon etir ikki alt sjálv. Tillukku við degnum og vit leingjast eftir einari víðkaðari útgávu av Matur og Matgerð.

je


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Útlitini so góð sum ongantíð



### Fiskasølumenn eru bjartskygdir og vænta, at góðu fiskaprísirnir fara at halda sær

FISKAPRÍSIR
*Edvard Joensen*

Samstundis sum fiskaprísirnir í Føroyum liggja á einum støði, teir ongantíð hava verið á fyrr, hevur ES gjørt av einaferð enn at lækka toskakvotuna í Norðsjónum. Hetta fer ivaleyst at stabilisera okkara høgu fiskaprísir, meta føroyskir fiskasølumenn.

Føroyskur fiskur er kappingarførur við allan annan fisk á europeiska marknaðinum, og líkt er til, at føroyingar hava skilt tey tekin, marknaðurin sendir.

Kaj Leo Johannesen, stjóri á sølufelagnum Farex, sigur, útlit eru til, at hesin høgi prísurin, vit uppliva í dag, fer at halda sær. Kappingin er øgilig, og føroyingar eru í teirri støðu, at eitt nú saltfiskurin hevur fingið rættiliga gott orð á seg.

Hetta kemst millum annað av, sigur Kaj Leo Johannesen, at føroyuski toskurin er rættiliga tjúkkur og hvítur, og tí góð søluvøra. Men so sanniliga eisisni tí, at føroyingar hava dugað at lurtað eftir marknaðinum og hava framleitt tað, marknaðurin vil hava. Og saltfiskamarknaðurin fer við so at siga øllum toskinum, sum kemur upp á land. Tað tykist mestsum ómøguligt, sigur Kaj Leo Johannesen, at fáa tosk at skera til flak.

Eitt annað, sum hjálpir væl upp á prísirnar, sigur Kaj Leo Johannesen, er at allar tær avtalurnar, sum fyrr vóru millum ymsar partar í fiskivinnuni, nú eru burtur.

Í eitt nú Íslandi síggjast enn summar av hesum avtalum, hann sipar til. Tað vil siga, at skip og virki eru samantvinna við ognarviðurskiftum og tí heft hvørt at øðrum.

Hesar avtalur eru millum annað við til at gera, at íslendingar ikki standa seg í kappingini við føroyingar, tí teir eru ikki nóg frælsir til at kappast, vísir stjórin í Farex á.

Hann nevnir sum dømi, at hann sjálvur hevur keypt lidna vøru frá íslendskum virkjum, sum síðan er seld aftur á europeiska marknaðinum fyri tann prís, føroyski marknaðurin fær.

Tað eru sjálvandi eisini onnur ting sum gera, at fiskamarknaðurin er góður, sigur Kaj Leo Johannesen.

Eitt nú at kjøtmarknaðurin hevur tað ringt í løtuni, nú neytaøði er farin at gera um seg í Europa.

Eisini er nógv minni fiskur til á heimsmarknaðinum yvirhøvur, og tá plagar prísurin heilt náturligt at hækka.

– Og hjá okkum ráða marknaðarkreftirnar nú 100%, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann staðfestir, at uppboðssølan hevur hjálpt væl upp á prísirnar, hóast hon ikki hevur skapt kappingina sum so.

Um akturellu støðuna við kvotunum í Norðsjónum sigur Kaj Leo Johannesen, at enn hevur tað ikki merkt støðuna hjá okkum so nógv, tí hendan tíðin vanliga er rættiliga góð sølutíð. Men hann ivast ikki í, at tað fer at stabilisera teir sera høgu prísirnar, sum í dag eru á fiskamarknaðinum. Hann metir tað snøgt sagt fara at vera løgið, um prísirnir fara at lækka fyribils.

# Fiskakeyparar óttast neytaøði

### Europeiskir fiskakeyparar krevja váttan fyri, at føroyskur alifiskur ikki verður fóðraður við fóðri, sum gjørt er av beinamjøli



FISKAMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*

Europeiskir fiskakeyparar tykjast nú eisini vera smittaðir av neytaøði og eru farnir at seta hana í samband við aldan fisk.

Kaj Leo Johannesen, stjóri á fiskasølufelagnum Farex, sigur við Sosialin, at franskur fiskakeypari, hann hevur samband við, hevur nevnt fyri sær, at marknaðurin fyri alisfiski kanska fer at verða ávirkaður skeivan veg av málinum um neytaøði. Brúkarin er so smátt farin at blanda tingini saman og torir ikki at keypa aldan fisk av ótta fyri, at fóðri kann hava partar av beinamjøli ella blóðmjøli frá neytum í sær.

Hetta kann gera, at eitt nú laksaútflutningurin kann fara at minka, metir fransmaðurin.

Og okkurt tykist vera um tosið. Í hvussu er sigur Regin Jacobsen á Alistøðini á Bakka á Glyvrum, at keyparar hava kravt, at teirra sølufelag skjalprógvar, at hvørki beinamjøl ella blóðmjøl verða brúkt í fóðrinum, teirra laksur fær.

Og tað verður tað heldur ikki, staðfestir Regin Jacobsen avgjørdur. Beinamjøl hevur ongantíð verið brúkt yvirhøvur. Og hóast blóðmjøl fyrr hevur verið nýtt í laksafóðri, varð tað steðgað longu í 1995.

Hetta hava kundarnir eisini fingið skjalprógvað, sigur Regin Jacobsen.

Tað sum hendir, sigur Regin Jacobsen, er tað, at tær stóru handilsketurnar í Europa, sum eitt nú Alistøðin á Bakka selir til, hava starvsstovur, sum alla tíðina kanna vøruna, tær keypa. Har verður vøran flokkað eftir uppruna og slagi, og eitt nú aldur fiskur verður flokkaður saman við øðrum aldum djórum sum til dømis neyti og grísi. Keyparin biður so um váttan fyri, at fóðrið, kríatúrið ella fiskurin hevur fingið, ikki er gjørt úr beinamjøli ella blóðmjóli.

Hesa váttan hevur Alistøðin á Bakka kravt og fingið frá fóðurframleiðara sínum. Síðan er hon send sum skjalprógv til keyparan. Og tað hevur keyparin verið nøgdur við, tí meira hevur alistøðin so ikki frætt um tað, sigur Regin Jacobsen.

Heldur ikki Føroya Havbúnaðarfelag veit nakað um hetta, sum fransmaðurin hevur borið upp á mál, sigur Hans Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum. Hann sigur, at hann hevur als ikki frætt hasi tíðindini fyrr enn nú. Men hann metir tó ikki at tey hava so nógv upp á seg.

Hans Jacobsen sigur, at Havbúnaðarfelagið fer ikki undir nakað lýsingarátak ella tílíkt at steðga slíkum, tí tað hevur felagið ikki pengar til. Men hann vísir á, at norðmenn, sum jú selja nógvan alifisk, hava brúkt nógvar pengar upp á júst slíka upplýsing.


